TILTØK

Fríkirkjan Oasan
Uppi á Brekku 3, Hoyvík
Friggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/ sørvingum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ klaksvíkingum.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

Missiónshúsið v/ Landavegin
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Bølingshúsinum á Norðasta Horni.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Martin Thomsen.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini møti, har Páll Poulsen talar. Evnið er: Trongdin byrjar á jørðini, Opinb. kap. 6. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.hebron.fo

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Sunnumorgunin Familjumøti kl. 10.30 har tala Símin Ósá og Óli Steinberg um »Trúboðaravirki í Grønlandi«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar m.a. Jógvan Zachariassen um »Týdningurin av einum – partur 1«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúli er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn- og bíbliutími. Øll eru vælkomin.
www.livdin.fo

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Friggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 14 Junior.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Finn Arvé prestur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli. »Hann fer undan tykkum til Galileu, har skulu tit síggja hann, soleiðis sum hann hevur sagt tykkum«. Mk. 16.7.

Meinigheitshúsið
Fríggjadagin kl. 19.30-21.30 Juniorhugni, frá 5. flokki.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti – eyka meinigheitsfundur. Manskórið syngur.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 Møti, major Njál Djurhuus talar.
Sunnudagsskúli kl. 14. Einki møti kl. 18, men farið verður á møti í Sørvági í Missiónshúsinum kl. 18, major Njál Djurhuus talar. Koyrt verður frá Tórsgøtu 19 kl. 16.30.

Frá Ebenezer
Friggjadag kl. 20 Teen-Night.
www.ebenezer.fo

Filadelfia
Landavegur 22
Í dag kl. 20 Ungdómsmøti v/ Vagn Jákupsson í Geil. Evnið er: »Andi, sál og likam«.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Malenu Meitilberg, evnið er: Gestablídni 1. partur, kl. 16 Samkomufundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Saron, Vestmanna
Morgunmøti verður sunnudagin kl. 11 v/ Breyðbróting.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

Frelsunarherurin, Sørvágur
Frelsunarherurin hevur møti í Missiónshúsinum Líbanon sunnudagin kl. 18, major Njál Djurhuus talar, sangarar og musikarar úr Havn luttaka.
Øll eru vælkomin.

Haldórsvík
Missiónsvikan heldur fram í Avhaldshúsinum í kvøld kl. 20. Ungdómurin skipar fyri. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Evnið 6. boð v/ Jefry Johannesen. Innsavnan til Leguhúsið í Nesvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Fríggjakvøldið kl. 21 skipar Sangbólkurin Salt fyri konsert.
Leygarkvøldið kl. 21: Awake við Alice Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 9.30-13 Temamorgun fyri hjún, øll áhugað vælkomin, kl. 17 Møti við Jastrid og Paula Høj, evnið: Familjan. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Samkoman Lívsins Orð, Saltangará
Sunnudagin kl. 10.30 Møti. Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

Eiði
Fríggjakvøldið Karmel kl. 19.30 Bíbliutími: Filippibrævið, kl. 20 Møti, Hannes syngur.
Leygardagin kl. 17 Barnamøti, kl. 19.30 Bíbliutími: Kolossubrævið, kl. 20 Møti við Alis og Martin Højrsted, Funningur. Glyvra Steingjakór syngur.
Sunnudagin kl. 12 Lestur, kl. 18.30 Bíbliutími: 1. Tessalónikubrævið, kl. 19 Møti við Niels J. Nielsen, Strendur. Innsavnan til Karmel.

Síloa, Fuglafirði
Á møtinum sunnudagin kl. 11 talar Justnes Eliasen um Rutt 2. kap. – Signingar á akrinum, og á møtinum kl. 18 talar Klæmint Eliasen um Rutt 3. kap. – Náttarfundurin.
Mikukvøldið 24. nov. kl. 19.30 talar Karl Jóhan Nielsen um Rutt 4. kap. – Loysarin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl. 18 Møti. Evnið: Heimamissiónin 100 ár v/ Hera Tróndheim o.ø.
Ungdómsmøti kl. 21.
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.

KFUM & K, Klaksvík
Missiónsvikan er hesa vikuna.
Friggjakvøldið kl. 19.30 Niels Jacob Nielsen, Gratia syngur.
Leygardagin kl. 10 Kaffi/te og rundstykkir. Bíbliutími við Torleif Jóhannessen, evnið: »Síðsti dagur«, kl. 19.30 Sangmøti frá sálmasangi til Gospel. Luttøka við stóra kórinum og barnakórinum á sangskeiðinum hjá Heimamissiónini, kl. 22.30 Ungdómskvøld. Gospelkórið Gleði og dramabólkurin av Glyvrum luttaka.
Sunnudagin kl. 14 Familjumøti, kl. 18 Møti við Bergur Debes Joensen, Streingjakórið í húsinum syngur, kl. 21 Møti við Bergur Debes Joensen og gospelkórið Gleði syngur.
www.kuff.fo

Betesda, Norðoyggjar
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

Soli Deo Gloria
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

Getsemane, Klaksvík
Friggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við Jens og Malenu Meitilberg. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Viðareiði
Leygarkvøldið 21. november kl. 21 Ungdómsmøti við ungdómi úr Emaus. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skálavík
Missiónsvikan byrjar hóskvøldið kl. 20 við Absalon Matras, sum eisini greiðir frá ferð til Rumenia.
Friggjakvøldið kl. 20 talar Andras Miðskarð o.a. úr Klaksvík.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Regin Høgnesen o.a. úr Leirvík.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Regin Høgnesen o.ø. úr Leirvík. Bæði kvøldini innsavning til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Skopun
Hvítusunnusamkoman Betania, Skopun var 14. nov. 50 ár. Í hesum sambandi verður komandi vikuskifti hátíðarhald í Samljóð, undir heitinum »Vit kunngera Jesus«.
Fríggjakvøldið kl. 19 Møti, Teodor Petersen syngur og talar.
Leygardagin kl. 15 Familjumøti. Stórt familjumøti fyri øllum sunnudagsskúlabørnum fyrr og nú. Vitjan av Absalon við dukkudreingjunum. Børn luttaka. Aftaná verður lagkaka og kaffi. Kl. 19 Møti, Ólavur Jacobsen talar. Sámal Hanni og Gerhard syngja.
Sunnumorgunin kl. 11 Møti í Betania, Einar Joensen talar. Ymiskar sangkreftir luttaka á møtinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldið vegna missiónsvikuna í Skálavík.
Mánadagin kl. 17 Barnarbeiði 1.-6. fl. kl. 19 Ungdómsarbeiði 7. fl. og eldri. Hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Kirstein Stórhamar og Signheðin Olsen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin í Vági
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eingrím Holm talar.
Mánadagin Bibiltími v/ Eingrím Holm, 1. Jóhs. Br. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Evangel. møtirøð í Vági
Í døgunum 19.-21. nov. verða evangel. møtir í Framtíðini. Fríggja- og leygarkvøldið byrja møtini kl. 20.
Sunnukvøldið byrjar møti kl. 21.
Møguleiki fyri forbøn verður á øllum møtunum. Eftir øll møtini er eisini møguleiki fyri at fáa eitt andalig prát við tey, sum standa fyri. Tað eru suðringar úr ymsum samkomum, ið standa fyri. Øll eru hjartaliga vælkomin at hoyra Guds orð.

Missiónshúsið í Hvalba
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Jónsvein Bech. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ørkin, Reykjavík
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

Møti í Føroyahúsinum
Fríggjakvøldið 19. nov. kl. 20.30 hevur Kristnastova møti í Føroyahúsinum, Rúni Olsen talar. Vitnisburður, drama og góður og lættur felagssangur. Økeypis te/kaffi og køkur. Ver ævlkomin.
Hetta kvøldið er einki fríggjakvøldsmøti í Kristnastovu, men í staðin í Føroyahúsinum kl. 20.30.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 15. november
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-17 Vit hugsa um jólini
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl. Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilm. tlf. 316491
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar Fridtleif Johannesen.
Komandi mánadagar kemur Birgar at vitja Tilhaldið, at kunna seg meira um Havnina
Týsdagin 16. november
kl. 10.00–11.30: Vit syngja. Jóhan R. Jaocbsen.
kl. 15.00: **Hugleiðingar um kvinnur í Havnini fyrru helvt av 1900 talinum**, Suni F. Jacobsen
Mikudagin 17. november
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 15.00 **Við bussi úr Steinatúni niðan á Ternurygg, ganga eftir gøtum út á Ringvegin. Oman aftur við bussi.**
kl. 17.00–21.00: Opið hús
Hósdagin 18. november
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt taluprát, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
Friggjadagin 19. november
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 13.00–17.00: Opið hús.

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Eldrahugni á Tvøroyri
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólikaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið Fløvi
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 15. november
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
Týsdagin 16. november:
Vit spæla Boccia
Mikudagin 17. november:
Vit gera bomm
Hósdagin 18. november:
Myndaveving fyri áhugað v/ Rannvu Gøte.
Fríggjadagin 19. november:
OPIÐ HUS. Kaffi, te og pannukøkur.

Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altið til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis.
Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480.
E-mail: ek_fo@get2net.dk

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmødrafelag.
Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Føroya Heimavirksifelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

Leygardagur kl. 19.05
Á Quiztinum
Í spurnarkappingini Á Quiztinum hesuferð, verða tað klaksvíkingar í útlegd, ið fara at kappast við politikkarar, ið hava tónleikin sum felagsnevnara, tí annað liðið verður mannað við Eyðuni Joensen, sálarfrøðingi, og Amariel Norðoy, listarmálara, meðan teir, ið manna hitt liðið, verða Rani Nolsøe, býráðslimur í Klaksvík, og Jørgen Niclasen, løgtingsmaður.
Gunnar Nolsøe leggur til rættis, og Tróndur Djurhuus er dómari.

Leygardagur kl. 20.00
Zip
Nú tað stundar ímóti jólum, og tey flestu fara til ymisk jólaborð, verður farið oman í býin at gera seg lekran.

Sunnudagur kl. 14.15
Dunnur millum Fjarða
Í sendingini verður prátað við hjúnini Óluvu Midjord og Regin Borðoy, sum eru bøndur. Í sjey ár hava tey havt sítt dagliga yrki á garðinum, og nú eru tey eisini farin undir at royna við øðrum møguleikum eitt nú dunnum. Vit hitta tey bæði í dagliga yrki teirra á garðinum millum fjarða.

Hósdagur kl. 19.00
Tilvera: Hvat vilt tú við tínum lívi?
Samrøða við Pætur Bærentsen. Hann sigur frá sínum langa vegi at finna frið í sálini. Hann sigur, at alt kom uppá pláss, tá hann kom í katólsku kirkjuna.

Nón
í útvarpinum í viku 48, frá 22. til 26. november
Nón bjóðar hesa vikuna áhugaverðar og fjølbroyttar gestir, alt frá kendum sangara, bónda, almennum stjóra, blaðskrivara við visjónum, til fyrrverandi ÍSF forseta.

Eivør Pálsdóttir
Eivør verður í føroyum fyrstu dagarnar í vikuni, tí hon gevur nýggja fløgu út, og í tí sambandi fer hon at syngja útgávukonsert í Müllers Pakkhúsi týskvøldið. Vit hoyra Eivør greiða frá nýggju fløguni, og sjónleikinum, sum hon spælir í Íslandi.

Anna V. Ellingsgaard
Anna er cand. mag. í enskum og norðurlenskum máli/bókmentum og skrivar dagliga greinar fyri Sosialin. Serligt fyri hennara skriving er at evnini eru sera viðkomandi, oftast við sosialum/samfelagsligum innihaldi. Til dømis nýta miðnámsskúlar greinar hennara sum próvtøkutilfar.

Jóannes Patursson
Jóannes Patursson er ungi bóndin í Kirkjubø. Heldur óvæntað hendi tað, at pápin knappliga ikki var meira. Umframt viðkomandi viðurskiftum í dag, fer Jóannes eisini at greiða frá søguligum viðurskiftum í Kirkjubø, og hvussu tað gongst við Múrinum.

Súsanna Danielsen
Súsanna er tann kendasti løgfrøðingurin í almennu fyrisitingini. Fyrst á Lønardeildini í Landsstýrinum og nú sum stjóri á Løgtingsskrivstovuni. Men Súsanna hevur eisini aðrar áhugar, til dømis bóndaskap og ferðing í fjarskotnum londum.

Erhard Næs
Erhard er hvalbingurin, sum var ÍSF forseti frá 1976 til '78, men hann er eisini kendur fyri annað. Erhard hevur annars stóran áhuga í søguligum viðurskiftum og kennir annars væl landið, tess mentan, og fólk.
Sendingin roynir at frætta, hvør goymir seg handan nøvnini - tankar, hugskot og fyrr ókendir eginleikar, ella vitan. Eisini roynir sendingin at býta dagarnar millum kynini, so væl sum tað nú ber til í eini gerandisviku við fimm døgum. Gestirnir velja tónleikin í Nóntímanum og royna seg í Landastrokspæli móti vertinum, Jákupi Magnussen.
Nón sendingin verður send kl. 15.03 og kl. 22.00.

Týsdagin kl. 15:
»Duettin«
bjóðar hesaferð upp á nýggjar tónar frá sangkvinnuni Mariu Anderssen.
Í einum sera hugnaligum og vikomandi práti við M. C. Restorff, hoyra vit Mariu í Ullvøruhúsinum greiða frá ymiskum hugsanum og hendingum, sum hava verið við til at mynda sang úrvælið á hennaran nýggju fløgu.
Og fyri fyrstu ferð í útvarpssøguni hoyra vit eisini sangfuglarnar báðar, Mariu og M. C., tríva í eina duett.

Endursent verður mikudagin 1. desember kl. 16 og fríggjakvøldið 3. desember kl. 19

397	SKYLDMAÐUR	MAÐUR	ANTONOV	HOND	LITUR	RUSSARI	EDD	NORSKUR BÝUR	IRAN	PLANTA	GUL	ST	MARSTAL	FAR !!	GALWAY	ATFINNING
STAÐANAVN	1															
STØK					GRAMM / TÝSKUR BÝUR		TROLARI / RIDDARI		2				BETA / KALIUM		TONS / FISKUR	
HJÁLJÓÐ			ØL / KVINNA					FYRRVERANDI	REIÐARÍ / STREYMUR			HÁLVOYGGJ / KVINNA				3
METUR		ONSHORE-HAVN / MAÐUR								4	KALIUM		SINNALAG / MUSICAL			
LOGAN							STÓRT NUMMAR / HEYK			SPANIA	SETA SEG / BILUR					
NÝ				ALFA / LAG		ILLVEÐURSLIGT	5	FARVU	BÝUR Í ARMENIA / PÍNU							ÍLAT
MELDA				6	DANS / KELINAVN					SKOTI				FRÁ / ÓSKIL		
NAVNHÁTTUR											SKIVA	HÓAST	7		ABERDEEN / ÍSLAND	
NITROGEN		SP. BÝUR / GRIKKSK OYGGJ					TITANIUM / OXYGEN			KOL / ØSA		GENTA / SPIRITUELT				
RÚSEVNI				NOKTAN	TÓNI / URAN		8	OPERA / UN					TRÆ / TVÍLJÓÐ			
GONGUSTJØRNA							SVÁVUL / KÁTUM		LITUR / EISINI NEVNDUR		BOYGGJ				ITALIA / KARTONG	
GUDUR			SPANIA / ALFA		IKKI FRAMMAN		9				TÝSKLAND / SVØRÍKI		ÓLAVSSØKA (NORSK)	POST SCRIPTUM		
	MAÐUR / CARBON				MISTER / KOS			NAVN / REAUMUR						TÍÐINDASTOVA		
KLASSI (STYTT.)			TIN	MIKLI / EGO		10			.	GRIKK. BÓKST	VREIÐI / ÍSAFJØRÐ-UR	11				
FRONSKÁ					OXYGEN	URAN / 1000		"KÆRA" (SPONSK) / VOKALUR						HJÁLJÓÐ / REX		
SKYLDKONAN														12		

Vinnari:
Rókur Olsen
í Garðsenni
850 Hvalba

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: BENDLATANG

B	O	R	G	A	R	S	T	R	Í	Ð		D	Á	R	A
R	A	I	N	B	O	W	W	A	R	R	I	O	R		S
A	S	T	A		M	A	E		A		N			K	K
N	A		D	O		Z	E	O	L	I	T	T	A	R	
D		I	D	A		I	D		Í	R	E	S	T	A	R
B	A	R	A		I	L		Á	Ð	U	R	E	N	N	
I	T	A	R		T	A	S	S		N	N		I	S	I
L	O	K		L	A	N	D	A	R		A	S		A	N
U	M	A	R		L	D	P		O	T	T	A	R		G
R	T	R		A	I			A	B	B	I	N		E	U
396	E	I	N	F	A	L	D	U	R		O	N	G	I	N
F	O		A	T		E		T	O	R	N	A	R		
U	R	U	G	U	A	Y		O	Y	R	A		Ø	S	A
L	I	T	O	R	I	N	A				L	Ø	N	A	R
L		A	Y			A	R	G	E	M	A	Ð	U	R	
A	L	H	A	M	B	R	A		E	M		A	R	A	N

Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).
Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.
Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

Loysunarorðið: **397**
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***
- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***
- ❑ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fugló*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt